EG MEINI TAÐ

# Eksperiment



*Sjúrður Gullbein*

Kongaminnið sær løgið út í dag. Tveir oljutangar eru surraðir um búkin á tí, og um reyvina hevur tað ein gamlan motor frá Strandferðsluni. Tað líkist mest eini rakett, og tað er tað satt at siga eisini. Við sínum sniði og skapi er tað nemliga vorðið eitt sjálvsagt miðpunkt í Føroya fyrstu og seinastu rúmdarætlan. Og í dag verður Kongaminnið skotið til himmals.

Fólk tysur niðan á heyg at uppliva løtuna, og vituliga hevur Tórbjørn landsstyrismaður fingið heiðurin at tendra, tí hann hevur verið í vási fyrr og er vanur við rakettir. Og hann er grúviliga spentur um hesa kongligu verkætlan. Satt at siga hevur hann ongantíð tendrað so stórt fyrr, men hetta er ein mergjað ætlan, so eyguni eru sum í smádreingi, tá hann brestir fyrsta svávulpinnin. Mannamúgvan ræðist og fer eftir hæli, men svávulpinnurin skuldi bara brúkast til ballið, sum var sløknað. Fólk ilskast og heldur hann vera lítið tignarligan, soleiðis at hugsa um guvin eina sovorðna løtu, men tað skulu tey ikki hava at siga. Hann spennir reimina um kelkin, skjýtur kollin niðurá og brestir aðru ferð. Við tryggari hond førir hann pinnin leiðina fram og tendrar.

Fssshhh, fýsir fjúsið - og so kemur tann spennandi tøgnin, áðrenn tað brestir. Hjá summum er løtan komin at siga sínum kæra farvæl, nú hann skal sína himmalferð, men onnur gera skjótari av. - Takk og farvæl, siga tey - og kom aldri aftur.

Og nú verður tað. - Kjokk, kjokk, sigur Kongaminnið. - Kjokk, kjokk, sigur tað. Og so ... og so hendir ikki meira. Tað kvøttir ikki úr kongsins steini. Ætlar sær vist ongan veg í dag. Tórbjørn rísnar og hugsar um hina rakettina á nyggjárinum, og sinnið spinnur í hann. Sovorðið skittans skrambul, hugsar hann og gevur rakettini sín strandafót í rassin, so bæði minnið og mannamúgva hvøkka við. Og nú ber til. Rakettin skelvur eina løtu, og við sínum tignarliga veldi lyftir hon sær spakuliga uppfrá. Tað brakar í hvørjum skoti, kylir í hvørjum koti, og so froysir Kongaminnið í einum flottum boga til himmals.

Soleiðis gjørdist endin á hesum steini, sum kortini sjáldan gjørdi annað enn at gána einkisigandi upp í tóman heim. Men Harrin veri við honum, og eingin stuttleiki við ongum álvara. Tí á tí niðurløgdu rakettstøðini verður skjótt ein nýggjur varði gjørdur. Ikki yvir kongar, sjálvandi, tí tað hevði verið býtt. Og ikki yvir mentagubbar heldur. Nei, har verður reistur ein fólksins varði. Ein varði yvir øll, sum liva, hava livað og fara at liva í okkara samfelag. Høgan sum lágan, ríkan sum vesalan. Ein varði, sum minnir okkum á, at vit øll eru partar av somu heild. At vit eru grund undir samfelagnum, og samfelagið undir okkum. At vit eru óloysiliga bundin at okkara medmenniskjum.

Og eina ferð um árið, ella kanska tá ið høvið býðst, kann hugurin leita til Fólkavarðan á heygnum, og so kann hvør einstakur spyrja sjálvan seg, hvussu sín lutur roynist. Tað hevði verið ein virðiligur varði, og lat so Kongaminnið súsa sína leið.

Vikuskifti

Postboks 19, 110 Tórsahvn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

# Thit Jensen 125

*Birgir Kruse*

Fríggjadagin í gjár vóru 125 ár liðin síðani Thit Jensen varð borin í heim í Farsø í Himmerlandi í Jútlandi. Hóast hon doyði í 1957 telist hon enn millum fremstu donsku kvinnuligu rithøvundar.

125 ára føðingardagurin varð hildin í heimbýnum Farsø, har Tith varð doypt Maria Kirstine Dorothea Jensen. Hon var fjórða barnið av ellivu. Millum hesu mongu systkin taldist hin ikki minni gitni skaldabróðurin Johannes V. Jensen. Nú øldin fór aftur um bak, varð skaldsøga hansara "Kongens Fald" skýrd aldarinnar danska søga. Sigst tó, at tey bæði skaldabornu systkini, Thit og Johannes, ikki vóru væl í øgn. So ósamd vóru tey, at ikki skuldi orð fella teirra millum, alt síðani aldarskiftið. Nítjanhundrað altso.

Áhugin at verða við í føðingar- ella rættari minningartiltakinum fyri Thit Jensen í Farsø í gjár hevur verið stórur. Mentadeildin í býnum, Kulturelt Samråd, upplýsir, at ikki færri enn 250 fremmandir føðingardagsgestir høvdu boðað frá luttøku. Hotel Farsø var karmurin um drúgvu føðingardagsskránna. Hotellið er dygst við "Thit Jensens Mindsetue".



*Thit Jensen saman við Karen Blixen í 1954*

Millum røðararnar í Farsø í gjár vóru radikali mentamálaráðharrin Elsebeth Gerner Nielsen, blaðkvinnan Lone Kuhlmann og rithøvundarnir Jytte Borberg og Hanne Faldborg. Allar kvinnur, so sum tað sømir seg, tá bókmentunarliga minnið um Thit Jensen rætt skal varðveitast.

"Hon hevði sínar meiningar og sína øði. Ella kanska er rættari at siga, at hon hevði øðina og har tóku meiningarnar støði", segði Karl Bjarnhof í eini minnisgrein, tá Thit Jensen andaðist í 1957. Speiandi, hevur Thit Jensen verið skýrd "Furien fra Farsø".

Á myndini, sum er tikin í 1954, sæst Thit Jensen (t.v.) saman við Karen Blixen. Hetta árið taldust tær millum best umtóktu rithøvundar Gyldendals. Vinkonur vóru tær tó ikki. Um Blixen segði Thit Jensen, at hon var "udenfor hverdagens liv, barnløs, indbilsk og uden tvivl ret ulykkelig i al sin glans".

# Tann lítli prinsurin

*Birgir Kruse*



Í dag letur upp sjáldsom framsýning við myndum og lutum úr søguni um "Lítla Prinsin" í Norðurlandahúsinum.

Tað er franska sendistovan í Keypmannahavn, ið hevur latið Norðurlandahúsinum lutirnar til framsýningina. Umframt plansjur, er eisini talan um modellflogfør og lutir, ið hoyra til søguna um "Tann Lítla Prinsin". Í fjør var hundrað ára dagur rithøvundans og tað er í hesum sambandi, at aktuella framsýningin er vorðin til.

Søguna skrivaði Antoine de Saint-Exupéry í 1946 og Alexandur Kristiansen týddi hana til føroyskt í 1980. Umframt føroyskt er bókin týdd til fleiri enn 120 tungumál og er í franska heimlandinum mest selda bókin, næst eftir Bíbliuna.

Í einum broti, sum eyðkennir stílin í søguni, møtir lítli prinsurin ótamda revinum og spyr:

- *Hvat merkir tað "at temja?"*

- Nakað, sum tey flestu hava gloymt. Tað merkir at knýta bond.

- *Knýta bond?*

- Ja, segði revurin. Fyri mær ert tú ikki annað enn ein lítil óviti, eins og hundrað túsund aðrir smáir óvitar. Eg havi ikki brúk fyri tær, og tú hevur heldur ikki brúk fyri mær. Fyri tær eri eg bert ein revur, eins og hundrað túsund aðrir revar. Men um tú vilt temja meg, so hava vit brúk fyri hvørjum øðrum. Tá verður tú tann einasti, sum hevur nakað at týða fyri meg, og eg veri tann einasti, sum hevur nakað at týða fyri teg.

- Nú skilji eg, segði tann lítli prinsurin. Tað er ein blóma... eg haldi, at hon man hava tamt meg.

- Tað er møguligt, segði revurin. Á Jørðini kann ein koma út fyri so nógvum.

("Tann Lítli Prinsurin" 1980, bls. 66)

Søgan, ið er um neyðlenda flogskiparan, sum í oyðimørkini møtir Lítla Prinsinum, man teljast millum klassikararnar fyri børn í øllum aldri. Fantastikkur, rópar onkur hetta slagið av skaldskapi. Nú bøkur sum Harry Potter og Heimurin Forni hava verið umrøddar, hevur eisini enska heitið "fantasy-bøkur" verið brúkt.

Í 1974 varð søgan um "Tann Lítla Prinsin" gjørd til film við Bob Fosse og Gene Wilder. Teir báðir Lerner og Loewe høvdu sett tónleik til tekstin, so ein ævintýrakendur sangleikur spurdist burturúr.



**UMMÆLI. Hugskotið til fantasy-bók er gott, meðan tað bilar við tilevningini, sigur Jógvan Isaksen í ummæli av fyrru bókini úr "Heiminum Forna" hjá Anfinni í Skála. Í næsta Vikuskifti ummælir Bergljót av Skarði bøkurnar úr "Heiminum Forna" við høvuðsdenti á seinnu bókina, sum nevnist "Ferðin til Zambora"**

# Dvørgar, vargmenn og annað valafólk




*Anfinnur í Skála við fyrru bókini úr Heiminum Forna " Hjá dvørgum í Níðafjøllum"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jógvan Isaksen*

Annfinnur í Skála: Heimurin forni 1. Hjá dvörgunum í Niðafjöllum. Ævintýrsøga. Umslag: Hannis Egholm. 264 bls. Sprotin 2000. Kr. 250

"Hjá dvørgunum í Niðafjøllum", ið er fyrsta skaldsøgan hjá Annfinni í Skála, er fyrri partur av søguni um Heimin Forna. Kjartan, sum er eitt sindur egin, gongur í studentaskúla, og mamman má í heilum koyra undir hann, tí hann gloymir seg burtur í telduspølum. Ein morgunin skal flokkurin hjá honum útferð niðan á Núgvuna, og í útvarpinum verður sagt frá bili, sum er farin útav Oyggjarvegnum við Huldustein, tí hann var um at koyra á ein reiðmann við spjóti. Løgreglan sigur, at hetta er fimti tilburðurin av hesum slagi, men tá ið sjaførarnir eru komnir úr bilunum er eingin at síggja.

Í einum dali á Núgvuni verður Kjartan sendur eftir lyngi og biður Hallberu, sum hann er skotin í, koma við sær. Tey elta ein ravn inn í eina holu millum nakrar klettar og stutt seinni eru tey í einum øðrum heimi, har fjøllini eru skógvaksin, og aftan fyri tey letur hellismunnin seg aftur.

Tey eru komin inn í Heimin Forna, har dvørgar, álvar, risar, vargmenn og menniskir liva hvørt um annað og ikki minst tráa eftir valdi. Kjartan og Hallbera eru lokkaði inn í eina miðaldarkenda tíðarflá, tí dvørgakongurin Gulnir hevur brúk fyri teimum at finna út av, hvar ið seinasti parturin av Gjallarhorninum er. Hetta stendur í bókini Skinngrýla, sum er at finna í býnum Xalar, har tann óndi Zarok kongur ræður. Verður blást í hornið renna teir sundurskildu heimarnir aftur saman, og bardagin verður so ræðuligur, at tað fer at hava ragnarøkur við sær.

Restin av søguni í hesum bindi — og ivaleyst tí næsta við - snýr seg um ferðina hjá teimum ungu frá dvørgunum í Niðafjøllum um álvarnar í Grátumýrum til landið Zambora, har Xalar er. Ferðin er vandamikil, tí vargmenn jagstra tey, og tað gert meiri og meiri ivasamt, hvønn tey yvirhøvur kunnu líta á, og hví Gulnir kongur er so altráúr eftir Gjallarhorninum.

## Vetur í túsund ár

Høvundurin hevur ivaleyst fingið íblástur frá høvundum sum C.S. Lewis og J.R.R. Tolkien, og líkleikar við bøkur hjá hesum eru tað fitt av. Í Narnia-bókunum hjá Lewis verður eisini fari úr okkara heimi inn í eina aðra tíð, og tað ber til at ferðast aftur og fram eftir ikki heilt greiðum reglum. Árstíðirnar í Heiminum Forna standa at kalla í stað, soleiðis at heyst hevur verið í túsund ár, og vetur fer at vera í onnur túsund ár. Ævinligur kuldi valdar somuleiðis í tí fyrstu Narniu-bókini, sum á føroyskum eitur "Ljónið, Gívurin og klædnaskápið".

Ein líkleiki aftrat við Narnia-bøkurnar er, at meðan drúgv tíð verður brúkt í tí heimi, tey koma til, so er "eingin tíð liðin í tykkara heimi", sum Gulnir kongur sigur (s.79). Vandamikla ferðin úr Niðafjøllum til Zambora er afturfyri lík ferðini hjá hobbunum í "Lord of the Rings" hjá Tolkien. Somuleiðis ryssuhjálmin, ið ger tey ósjónlig og vitjanin hjá álvum. Viðurskiftini millum dvørgar, álvar og aðrar verur ber eisini á brá bøkurnar hjá Tolkien. (Hesar verða eisini tiknar upp á tungu á s. 83).

## Ein góð bók?

Tað er lætt at ummæla eina góða bók, tí tú hevur hjartað við í skrivingini, og hjá summum gevur ummælið av eini vánaligari bók málinum eitt serligt flog. Tað er eins og ummælarin rættiliga kann válka sær í, hvussu óbrúkilig, tápulig og kanska skaðilig útgávan er. Ímillum hesi avbrigdini er tann stóra nøgdin av miðalbókum, sum eru tær truplastu at skriva um, tí tú vilt hava tað røttu vágina í tína meting. "Hjá dvørgunum í Niðafjøllum" liggur og riðar á markinum í neðra.

Hugskotið til "Heimin Forna" er gott, og høvundurin leggur upp til nógvar góðar møguleikar, men hann spillir teir flestu av teimum við pjakutum skrivingarlagi við alt ov nógvum endurtøkum. Til dømis verður lýsingarorðið kløkkur tránýtt í tann mun, at lesarin loksins hveppir seg, hvørja ferð tað kemur fyri. Frásøgnin er um somu tíð ov neyv og ikki nóg neyv. Lesarin fær í summum førum hvørt klædnaplaggið lýst, meðan hann aðrastaðni lítið og einki fær at vita um hvørki umhvørvi, útsjónd á fólki, mat o.s.fr. Stundum ótolnast tú, tí frásøgnin uttan grund tøvir, og stundum er søgan tann bera gongd og eingin dýpd. Fitt av smærri mótsøgnum og anakronismum rekast eisini uppií.

"Hjá dvørgum í Niðafjøllum" er uppfinningarrík og í støðum spennandi, so tað er lítil ivi um, at mong børn og ung fara at fúka ígjøgnum hana. Somikið meira spell, at høvundurin ikki hevur fingið leiðbeining, áðrenn bókin fór til prentingar. Vórðu endurtøkurnar færri, og frásøgnin sum heild strammað, hevði úrslitið ivaleyst verið meira heilskapað enn sum er. Forlag og prentsmiðja hava heldur ikki verið at sær komin, tá ið tað snýr seg um uppseting, tí innskjótingar aftan á reglubrot mangla í heilum.